# PENSJÓNSAVTALA

millum

**Arkitektafelag Føroya**
**Føroya Byggifrøðingafelag**
**Føroya Magistarafelag**
**Føroya Musikklærarafelag**
**Føroya Tekniska Lærarafelag**
**Føroya Verkfrøðingafelag**
**Yrkisfelagið Miðnám**

og

**Tryggingarfelagið LÍV**

við gildi frá 1. januar 2019

# INNIHALDSYVIRLIT

| | | |
|---|---|---|
| § 1 | Sáttmálapartar .................................... | s. 3 |
| § 2 | Innihald ................................................ | s. 3 |
| § 3 | Hvør er fevndur av pensjónsavtaluni .... | s. 3 |
| § 4 | Innliman ............................................. | s. 4 |
| § 5 | Tryggingarskeið ................................... | s. 4 |
| § 6 | Einstaklingatryggingar ......................... | s. 5 |
| § 7 | Pensjónsgjald ....................................... | s. 5 |
| § 8 | Útgjald av tryggingarupphædd ............. | s. 6 |
| § 9 | Skattur ................................................. | s. 6 |
| § 10 | Um farið verður úr fakfelagnum ........... | s. 6 |
| § 11 | Afturkeyp ............................................ | s. 7 |
| § 12 | LívPensjón .......................................... | s. 7 |
| § 13 | Trygging við óarbeiðsføri ...................... | s. 8 |
| § 14 | Samlagstrygging .................................. | s. 9 |
| § 15 | Sjálvstøðugur váðisbólkur ..................... | s. 9 |
| § 16 | Felags treytir ....................................... | s. 10 |
| § 17 | Gildiskomudagur og uppsøgn ............... | s. 11 |

## § 1. SÁTTMÁLAPARTAR

Sum liður í pensjónsavtalu millum Tryggingarfelagið LÍV - her nevnt "LÍV", og

- Arkitektafelag Føroya
- Føroya Byggifrøðingafelag
- Føroya Magistarafelag
- Føroya Musikklærarafelag
- Føroya Tekniska Lærarafelag
- Føroya Verkfrøðingafelag
- Yrkisfelagið Miðnám

verður hesin sáttmáli gjørdur partanna millum. Sáttmálin hevur gildi frá 1. januar 2019.

Sáttmálin er bundin (obligatoriskur) fyri teir limir, sum eru fevndir av alment galdandi sáttmála, ið fakfeløgini hava gjørt við arbeiðsgevara - her verður serliga hugsað um Fíggjarmálaráðið, men kann seinni eisini fevna um t.d. KAF og FAG.

Teir limir, ið ikki eru fevndir av bundnu avtaluni, ið er nevnd omanfyri, kunnu velja at vera fevndir av hesum sáttmála. Teir limir, ið longu hava avtalu við annan veitara, kunnu halda fram við hesari avtaluni.

Ynskja omanfyri nevndu fakfeløg, at onnur fakfeløg eisini skulu koma undir pensjónsavtaluna, er møguleiki fyri hesum. Hetta verður gjørt við einum ískoyti til sáttmálan.

## § 2. INNIHALD

Sáttmálin fevnir um LívPensjón(§ 12), óarbeiðsføristrygging(§ 13) og samlagstrygging(§ 14).

## § 3. HVØR ER FEVNDUR AV PENSJÓNSAVTALUNI

Fevndir av pensjónsavtaluni eru virknir limir, sum rinda limagjald til omanfyri nevndu feløg.

Limur kemur inn í skipanina, við at arbeiðsgevarin rindar pensjónsgjaldið til LÍV. Tryggingin tekur við frá fyrsta starvsdegi, sambært ásetingunum í § 4.

Við innliman verður send fráboðan til avvarðandi fakfelag, sum síðani boðar LÍV frá aftur, um viðkomandi ikki er virkin limur í felagnum. Uttan limaskap er ikki møguligt at tekna tryggingar eftir hesum sáttmálanum.

Limir, sum rinda inn til pensjónstrygging við Landskassaveðhaldi, eru fevndir av samlagstryggingini, men fylgja annars uppruna sáttmálanum, ið tryggingin varð teknað eftir. Limur kann tó velja at nýta hesa avtaluna. Tá verður upprunaavtalan umskrivað til frítrygging.

Tænastumenn, ið starvast á økinum hjá omanfyri nevndu feløgum eru bert fevndir av obligatorisku samlagstryggingini. Her er tað fakfelagið, sum stendur fyri inn- og útliman. Limurin rindar tryggingargjald til fakfelagið og LÍV sendir fakfelagnum rokning fyri tryggingina.

## § 4. INNLIMAN

Treytin fyri upptøku eftir hesari pensjónsavtaluni er, at limurin er fult arbeiðsførur. Arbeiðsgevarin váttar, at limurin er fult arbeiðsførur í sambandi við innliman. Fult arbeiðsførur merkir, at starvið á ongan hátt er tillagað arbeiðsorkuni hjá liminum. Kann arbeiðsgevarin ikki vátta fult arbeiðsføri, verður hetta fráboðað LÍV. Tá verður svarað persónlig heilsuváttan, sum limurin letur LÍV til støðutakan. Støða verður síðani tikin til, undir hvørjum treytum ella um pensjónstrygging kann teknast fyri limin.

Hevur LÍV ikki móttikið nevndu arbeiðsgevarváttan ella umbidnar heilsuupplýsingar, innan 3 mánaðar frá avtalaða tekningardegnum, verður stovnað ein ellispensjón uttan nakran tryggingarpart.

Eftir innliman, sendir LÍV eina fráboðan til limin. Her verður víst til Kundaportalin hjá LÍV, har limurin hevur møguleika at síggja tær upplýsingar, sum knýta seg til einstøku pensjónina. Um limur ynskir tað, sendir LÍV, einaferð um árið tryggingaryvirlit, sum vísir, hvørji rættindi limurin hevur til pensjón og trygging.

## § 5. TRYGGINGARSKEIÐ

Limur kemur í skipanina, tá hesin verður settur í starv og er virkin limur í einum av omanfyri nevndu feløgum. Innliman sambært ásetingunum í § 3.

Tryggingarskeiðið endar tann 1. í mánaðinum eftir at limurin er fyltur 67 ár, ella við deyða áðrenn.

Tryggingingarparturin fellur tó burtur, tá limur ikki longur er limur í einum av fevndu fakfeløgum. Limurin hevur tá rætt til at tekna framhaldstrygging. Verður hetta gjørt innan 2 mánaðir eftir at limurin fer úr felagnum, er ikki neyðugt at lata inn nýggjar heilsuupplýsingar. Tryggingin verður tá teknað sum persónlig trygging á einstaklinga grundarlagi.

## § 6. EINSTAKLINGATRYGGINGAR

Ynskir limur at tekna tryggingar við hægri upphædd, enn tær sum ásettar eru í pensjónssáttmálanum, er møguleiki fyri at tekna hesar á einstaklinga grundarlagi.

Tá verða tær upphæddir, sum liggja omanfyri ásettu upphæddirnar í sáttmálanum, teknaðar eftir teimum ásetingunum við innliman, sum eru galdandi fyri einstaklingar. Samlaða tryggingargjaldið til persónstryggingar, kann í mesta lagi vera 1/3 av pensjónsinngjaldinum.

## § 7. PENSJÓNSGJALD

Pensjónsgjaldið fellur til gjaldingar frammanundan, tann 1. í hvørjum mánað.

Tryggingargjaldstíðarskeiðið endar í tí mánað, tryggjaði nær pensjónsaldur, fer frá við pensjón, við deyða ella óarbeiðsføri áðrenn.

Óarbeiðsføristrygging: Gjaldið verður goldið av pensjónsgjaldinum.

Gjaldið fyri óarbeiðsføristryggingina verður ásett árliga við støði í skaðagongdini í undanfarna árinum og tekniska grundarlagnum hjá LÍV.

Samlagstrygging: Gjaldið verður goldið av pensjónsgjaldinum.

Gjaldið fyri samlagstryggina er ásett til fast krónutal í einum 5 ára skeiði fram til 1/1-2024.

Persónligar tryggingar á einstaklinga grundarlagi: Gjaldið verður goldið av pensjónsgjaldinum.

Fyri **limir í Yrkisfelagnum Miðnám** og fyri tænastumenn, sum eru **limir í Føroya Tekniska Lærarafelag** er galdandi, at hesir rinda tryggingargjaldið fyri samlagstrygging til avvarðandi fakfelag, sum síðani rindar tryggingargjaldið til LÍV. Um hesi fakfeløg ynskja at skipa tryggingargjaldið á annan hátt, kann hetta gerast í samráð við LÍV.

**Gjaldsskái:** Verður hildið uppat at rinda tryggingargjald, og tryggingargjald ikki er goldið 3 mánaðir eftir seinasta gjalddag, verður gjaldsskái veittur í tilsamans 1 ár, uttan at rætturin til trygging í hesum føri verður broyttur. Gjaldið fyri tryggingarpartin verður mótroknað í uppsparda virðinum á pensjónstryggingini.

Tað kann tó ikki verða givin gjaldsskái fyri longri tíðarskeið, enn at gjaldið fyri tryggingarpartin kann rúmast í uppsparda virðinum. Íroknað tryggingarpartin eru óarbeiðsføris- og samlagstryggingin og møguligar persónligar tryggingar á einstaklinga grundarlagi.

**Frítrygging:** Um inngjald av tryggingargjøldum ikki byrjar aftur innan 1 mánað eftir at tíðarskeiðið fyri gjaldsskáa er lokið, verður tryggingin umskrivað til frítrygging. Tá fellur óarbeiðsføris- og samlagstryggingin burtur. Limur kann søkja um at fáa tryggingina umskrivaða til frítrygging, í staðin fyri gjaldsskáa.

## § 8. ÚTGJALD AV TRYGGINGARUPPHÆDD

**Útgjald við deyða:** Útgoldið verður til "næsta avvarðandi", uttan so, at onnur skrivlig avtala er gjørd við LÍV. "Næsti avvarðandi" er í hesum sambandi "fyrst hjúnafelagin, tínæst børn, og síðani arvingar sambært testamenti ella arvalógini". Við børn er her at skilja lívsarvingar og ættleidd børn hjá tryggjaða.

**Aðrar tryggingarupphæddir/veitingar** verða útgoldnar til limin.

## § 9. SKATTUR

Tryggingarparturin verður rindaður við skattaðum peningi, sostatt er eitt møguligt tryggingarútgjald í samband við deyða, óarbeiðsføri og "ávísar hættisligar sjúkur" skattafrítt.

**Samansparing og renta**, sum stavar frá inngjøldum fram til og við 31.12.2011 verður útgoldin í tráð við ásetingar í Rentutryggingarlógini. Avgjald og/ella skattur verður frároknað í samband við útgjald.

**Samansparing og renta**, sum stavar frá inngjøldum í tíðarskeiðnum 01.01.2012 til og við 31.12.2013 verður útgoldin í tráð við ásetingar í Rentutryggingarlógini. Útgjaldið er skattafrítt.

Møguligt er at flyta samansparing í hesum tíðarskeiði til útgjaldið í tráð við Eftirlønarlógina.

**Samansparing og renta**, sum stavar frá inngjøldum frá 01.01.2014 og frameftir verður útgoldin í tráð við ásetingar í Eftirlønarlógini. Útgjaldið er skattafrítt.

Skattur og avgjøld, sum LÍV sambært teimum til eina og hvørja tíð galdandi lógum og reglum er áløgd at afturhalda, ganga frá øllum útgjaldingum. Skattagrundarlagið hjá tí einstøku skipanini er tilskilað í tryggingaryvirlitinum.

## § 10. UM FARIÐ VERÐUR ÚR FAKFELAGNUM

Fer limur úr felagnum, áðrenn pensjónin tekur við, kann limurin velja, at rættindini verða umløgd til sjálvstøðuga trygging, uttan at kravdir verða nýggjar heilsuupplýsingar. Hetta verður gjørt á einstaklingagrundarlagi.

**Framhald av pensjónstryggingini:** Limir hava rætt til sjálvir at halda fram við tryggingini við sama ella lægri tryggingargjaldi. Nýggjur arbeiðsgevari kann eisini halda fram at rinda til skipanina.

LÍV krevur bert nýggja heilsuváttan, um tryggingarupphæddirnar hækka í tann mun, tær vanligu reglurnar hjá LÍV gera hetta neyðugt.

Ynskir limur ikki at halda áfram við inngjaldinum, kann tryggingin umskrivast til frítrygging. Tá fellur óarbeiðsføris- og samlagstryggin burtur.

## § 11. AFTURKEYP

Sambært ásetingunum í Eftirlønarlógini, kann samanspart virðið av inngjøldum eftir 1/1-2014 ikki afturkeypast. Samansparingin er bundin fram til pensjónsaldur.

Uppspart virðið fram til og við 31/12-2013, fylgir ásetingum í reglugerð hjá Fíggjarmálaráðnum um afturkeyp.

Stavar partur av afturkeypsvirðinum frá tryggingarskjali, sum tryggjaði hevði frammanundan fakfelagsavtaluna við LÍV, eru fyrru afturkeypstreytirnar galdandi fyri henda partin.

## § 12. LÍVPENSJÓN

Spart verður saman á kapitalgrundarlagi í tráð við ásetingarnar í Eftirlønarlógini. Hetta merkir, at virðið í inngjaldingartíðini er at meta sum kapitalsamansparing við arvarætti, um limurin ikki hevur valt at stovna samansparingina sum lívrentu við innliman.

Samansparingin verður rentað við marknaðarrentu.

Útgoldið verður tá limurin nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, limurin fær fólkapensjón. Tá verður útgoldið eftir ásetingunum í Eftirlønarlógini, ið eru soljóðandi (2014)

1) Í minsta lagi 45% skal gjaldast út sum ein lívrenta. Verður útgoldin mánaðarliga so leingi limurin er á lívi, men fellur burtur, tá limurin doyr.
2) Í mesta lagi 55% kann verða útgoldið sum lutapensjón. Verður útgoldin mánaðarliga í líka stórum lutum, yvir avtala áramál, tó í minsta lagi 10 ár.
3) Í mesta lagi 15% kann útgjaldast sum kapitalútgjald. Verður útgoldið í einum.

Víst verður eisini til § 10 í Eftirlønarlógini í sambandi við undantak til omanfyri standandi áseting.

Samanspart virðið og renta av hesum virði, sum stavar frá tíðarskeiðnum fram til og við 31/12-2013 verður útgoldið í tráð við tær avtalur, sum gjørdar eru fram til henda dag og fylgja útgjøldini ásetingunum í Rentutryggingarlógini.

Um limur ynskjur at flyta uppspart virðið frá aðrari pensjónsskipan, er møguligt at flyta hetta inn á LÍV eftir somu útgjaldstreytum sum upprunaavtalan.

Limir, sum rinda inn til pensjónstrygging við Landskassaveðhaldi, eru ikki fevndir av LívPensjón, men fylgja uppruna sáttmálanum, ið tryggingin varð teknað eftir.

## § 13. TRYGGING VIÐ ÓARBEIÐSFØRI

Gerst limur 2/3 ella meira óarbeiðsførur, í tryggingarskeiðnum, og óarbeiðsføri hevur staðið við í 3 mánaðir, verður tann árliga tryggingarveitingin útgoldin í mánaðarligum veitingum. Fyrsta útgjaldið verður tann 1. í mánaðinum eftir at 3 mánaða skeiðið er lokið.

Útgoldið verður so leingi óarbeiðsføri´ð stendur við og limurin er á lívi, tó í mesta lagi fram til endan av tryggingarskeiðnum.

Tryggingarskeiðið er fram til 1. í mánaðinum eftir at limurin er fyltur 67 ár.

Fyri 2019-2023 er árliga tryggingarveitingin sett til **kr. 92.900,-** Útgoldið verður í mánaðarligum veitingum.

Tá limur fær rætt til veiting við óarbeiðsføri, rindar LÍV ta tryggingarveiting, ið var galdandi, tá limurin gjørdist óarbeiðsførur. Veitingin verður ikki prístalsviðgjørd, hækkað ella lækkað fyri viðkomandi lim, um felagið broytir tryggingarhæddirnar.

**Gjaldsundantøka**
Um so er, at arbeiðsorkan verður skerd við 2/3 ella meira, verður veitt gjaldsundantøka. Tá fellur inngjaldið til pensjónsskipanina burtur aftaná 3 mánaðir, og LÍV rindar hetta so leingi óarbeiðsførið stendur við og limurin er á lívi. Um neyðugt verður goldið heilt fram til pensjónsaldur ella tá farið verður frá við pensjón. Gjaldsundantøka verður veitt fyri ta upphædd, sum inngoldin var, tá gjaldsundantøkan varð játtað.

Gjaldsskái: Verður pensjónstryggingin sett í gjaldskáa, verður tryggingargjaldið til óarbeiðsføristryggingina goldið av samansparda virðinum á tryggingini.

Frítrygging: Verður pensjónstryggingin umskrivað til frítrygging, fellur trygging við óarbeiðsføri burtur.

## § 14. SAMLAGSTRYGGING

Lívstrygging: Við deyða verður útgoldið soleiðis

| | |
|---|---|
| Limir, til og við 59 ár | kr. 800.000,- |
| Limir, 60-61 ár | kr. 700.000,- |
| Limir, 62-63 ár | kr. 600.000,- |
| Limir, 64-66 ár | kr. 500.000,- |

**Ávísar hættisligar sjúkur**: Útgoldið verður sambært tryggingartreytum fyri "ávísar hættisligar sjúkur".

| | |
|---|---|
| Tryggingarupphædd hjá liminum | kr. 150.000,- |
| Tryggingarupphædd hjá børnum | kr. 150.000,- |

Møguligt útgjald í sambandi við hættisliga sjúku verður ikki mótroknað í veitingini við deyða.

Tryggingin fyri "ávísar hættisligar sjúkur" tekur við frá innliman, sambært ásetingunum í § 4.

**Hoyritól:** Fær limur játtaðan stuðul sambært kunngerð um hoyritól, gevur hetta samstundis rætt til eitt útgjald frá tryggingini. Útgoldið verður sambært játtan um stuðul og rokning frá veitaranum. Tryggingin rindar tað, sum liggur omanfyri játtaða stuðulin, tó í mesta lagi kr. 4.000,- fyri hvørt hoyritólið sær.

## § 15. SJÁLVSTØÐUGUR VÁÐISBÓLKUR

Sjálvstøðugur váðisbólkur verður gjørdur fyri samlagstryggingina, ið fevnir um trygging við deyða og "ávísar hættisligar sjúkur" og hoyritól.

Avtalan um sjálvstøðugan váðisbólk er galdandi fyri eitt 5-ára skeið. Uppgjørt verður á hvørjum ári, og roknskapur gjørdur. Eitt møguligt yvirskot ella hall, verður ført víðari til næsta árið. Tá 5 ára skeiðið er lokið, eru tað fakfeløgini, sum eiga eitt møguligt yvirskot og LÍV rindar eitt møguligt undirskot. Síðani verður byrjað aftur av nýggjum eftir sama leisti í eitt nýtt 5 ára skeið.

Serlig reglugerð verður gjørd í sambandi við útlutan av einum møguligum yvirskoti.

Verður avtalan uppsøgd í 5-ára skeiðnum, er tað saldan á uppsagnardegnum, sum avgerð, hvussu avroknað verður. Er saldan á bólkaroknskapinum positiv, rindar LÍV yvirskotið aftur til fakfeløgini. Er saldan negativ, rinda fakfeløgini undirskotið inn til LÍV.

## § 16. FELAGS TREYTIR

Einstaki limurin eigur sína pensjónstrygging og kann taka hana við sær til annan pensjónsveitara, um limurin tekur við øðrum starvi, ið er uttanfyri sáttmálaøkið. Allar treytir í hesum sáttmála verða at galda fyri flutta virðið til eina nýggja pensjónstrygging, uttan mun til, um inngoldið verður av nýggjum arbeiðsgevara ella liminum sjálvum.

Afturat ásetingunum í hesum sáttmála koma allar pensjónstryggingar undir Almennu tryggingartreytirnar hjá LÍV, Tryggingartreytir fyri ávísar hættisligar sjúkur, lóg um tryggingaravtalur, Eftirlønarlógin og aðrar reglur í galdandi lógum.

Tryggingarnar verða útroknaðar eftir tí til eina og hvørja tíð galdandi loyvisútrokningargrundarlagi hjá LÍV, ið er góðkent av Tryggingareftirlitinum.

Gjaldi og gjaldsskrá kann verða broytt, um tekniska grundarlagið verður broytt.

Umsitingargjald verður roknað sambært tekniska grundarlagnum hjá LÍV. Umsitingargjøld kunnu broytast, við at tekniska grundarlagið verður broytt.

Koma broytingar í virkisgrundarlagnum ella tryggingatreytum, skal LÍV skrivliga fráboða fakfeløgunum hesar broytingar.

## § 17. GILDISKOMUDAGUR OG UPPSØGN

Hesin sáttmáli kemur í gildi 1. januar 2019, og avloysir undanfarnar sáttmálar og ískoytir partanna millum um pensjóns- og samlagstrygging.

Sáttmálin kann sigast upp skrivliga, galdandi fyri hvørt einstakt fakfelag sær, ella av LÍV við 3 mánaða ávaring fram til ein 1. í einum mánaði. Fyri LÍV kann uppsøgn av hesum sáttmála bert galda fyri skylduna til at innlima nýggjar limir í skipanina.

Sáttmálin verður undirskrivaður í 8 einsljóðandi eintøkum, og fær hvør partur sítt eintak í varðveitslu.

Tórshavn, tann 13.12.2018

**Tryggingarfelagið LÍV**

Jan Jakobsen
Stjóri/CEO

Brynhild Absalonsen
Kundaleiðari

Tórshavn, tann 13.12.2018

**Arkitektafelag Føroya**

**Føroya Byggifrøðingafelag**

**Føroya Magistarafelag**

**Føroya Musikklærarafelag**
MUSIKKLÆRARAFELAG FØROYA

**Føroya Tekniska Lærarafelag**

**Føroya Verkfrøðingafelag**

**Yrkisfelagið Miðnám**